## Leikarar stuðla McLaren

Úrslitini hjá enska landsliðsvenjaranum, Steve McLaren, hava ikki verið av teimum bestu, og flerii vilja hava hann úr starvi sum enskur landsliðsvenjari. Nú fær hann tó stuðul frá landsliðsspælarunum. – Tað eru vit og ikki venjarin, sum hava skyldina. Hann fyrireikaði okkum væl til dystirnar ímóti Ísrael og Andorra, sigur liðskiparin, John Terry, og hann fær stuðul av Steven Gerrard. – McLaren er okkara venjari, og vit trúgva uppá hann. Enska liðið bleiv pifta av vøllinum ímóti Andorra, sjálvt um teir vunnu 3-0. Áskoðararnir mettu ikki, at spælið var nóg gott.

## Feløg imponeraði av Bendtner

Nicklas Bendtner skoraði einasta málið í vinardystinum ímillum Týskland og Danmark mikukvøldið, og unga stjørnuskotið spældi annars ein sera góðan dyst. Nú eru fleiri av týsku stórfeløgunum áhugaði í Bendtner. Bæði Bayern München, Dortmund og Schalke høvdu fólk á staðnum at hyggja eftir unga dananum. Lyon hevur eisini víst áhuga fyri unga dananum í longri tíð. Bendtner er knýttur at enska Premier League-felagnum Arsenal, men er í løtuni leigaður út til Birmingham í næstbestu deildini.

# Gott lag í báðum legunum

**Einasti spælarin, sum ikki er tøkur undan uppgerðini millum GÍ og EB/Streym, er álopsspælarin Arnbjørn Hansen**

GÍ-EB/STREYMUR
*Jákup Mørk*

Tað er uppgerðin millum felagið, sum í níti árunum átti besta fótbóltsliðið í Føroyum, og felagið, sum í fjør átti besta fótbóltsliðið í Eysturoy og næstbesta liðið í Føroyum, sum er á skránni, tá ið GÍ og EB/Streymur bresta saman í Sarpugerði sunnudagin.

EB/Streymur hevur tryggjað sær pláss í fjórðingsfinaluni í steypakappingini, meðan GÍ framvegis eigur fyrsta týdningarmikla dystin í hesum árinum til góða. Steypadysturin ímóti KÍ verður flaggdagin.

Generalurin á GÍ liðnum, Sámal Joensen, hevur verið burturi frá venjing í hálva aðru viku. Hann hevur verið upptikin av landsliðskjansinum.

Allir teir gulu og bláu, sum hava verið við í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið eru tøkir í morgin. Veteranurin og lyklaspælarin Poul Ennigarð hevur verið sjúkur í vikuni, men í Gøtu verður roknað við, at hann fer at spæla sunnudagin.

Í EB/Streymi er tað greitt, at ársins stjørnuskot í fjør, Arnbjørn Hansen, ikki verður við í Gøtu. Beinbrotið í steypadystinum ímóti B71 ber við sær, at vandamikli álopsspælarin ikki verður førur fyri at spæla nógvu tær næstu vikurnar.

Fleiri av hinum spælarunum hava ikki verið førir fyri at venja við fullari ferð í hesi vikuni, men tá ið sunnudagurin fer at upprenna, fara teir allir at verða tøkir.

Hans Pauli Samuelsen hevur higartil í ár ikki verið førur fyri at venja við fullari ferð. Tað gjørdi hann hóskvøldið, og hann verður heilt víst ímillum teir fyrstu ellivu hjá EB/Streymi, sum plagar at standa seg væl í Sarpugerði.



# AB er á aldukambinum

**Stórur áhugi er á Argjum, nú nýggjar fótbóltstíðir eru í felagnum, sum sunnudagin við fylgi fer til Vágs, har hondbóltsspenningurin fyllir rættuliga nógv í hesum døgum**

VB/SUMBA-AB
*Jákup Mørk*

Verður VB meistari í kvinnuhondbólti. Tað er spurningurin, sum hevur fylt og fyllir nógv í Vági og Suðuroy í hesum døgum. Orsøkin er eyðsýnd, tí VB vann fyrsta finaludystin á heimavølli ímóti Stjørnuni, og í morgin skulu tær spæla í Klaksvík.

Samstundis verður síðsta hond løgd á fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið í fótbólti. VB/Sumba tapti tepurt á Skála í steypakappingini. Tað er sera týdningarmikið hjá VB/Sumba at standa seg væl á heimavølli. Ikki minst tá ið tað eru uppflytararnir, sum vitja.

VB/Sumba hevur nógvu tey seinastu árini ikki staðið seg nakað serligt fyrsta partin av kappinini. Tað ætla teir at broyta í ár, og fyritreytirnar eru so mikið góðar, sum tær kunnu verða. Allir spælararnir eru tøkir undan AB vitjanini.

Á Argjum er spenningurin øgiliga stórur. Hetta er fyrsta ferðin, at AB skal royna seg í fremstu røð, og óvæntaði steypasigurin í Gundadali ímóti B36 hevur borið eyka spenning við sær.

Sammett við liðið, sum í fjør flutti upp, er nógv nýtt á Argjum. Ímóti B36 vóru millum teir fyrstu ellivu fýra, sum eisini vóru við í fjør. Nú eru Rani D. Christiansen og Hanus Jacobsen, sum er komin úr Gøtu, komnir fyri seg eftir skaða. Harvið eru allir AB spælararnir tøkir uttan Jón Nielsen, sum hevur ryggtrupulleikar at dragast við.

AB er á aldukambinum, og so er spurningurin, hvussu tað verður, tá ið teir sunnukvøldið fara at koma norður aftur úr Suðuroy í góðveðrinum, sum tað verður sagt frá fer at verða í vikuskiftinum.

## Lagt verður fyri við stórdysti

**B68 og FSVágar04, sum bæði hava fyrireikað seg væl til at vera við í kappingini um uppflyting, hittast á Svangaskarði í fyrsta umfari**

1. DEILD
*Jákup Mørk*

Í næstbestu deildini verða í fyrsta umfari tveir dystir, sum beinanvegin fara at geva ábending um, hvussu tað stendur til hjá teimum, sum hava fyrireikað seg til at vera við í kappingini um uppflytingarplássini.

Á Svangaskarði hittast B68, sum flutti niður í fjør, og FSVágar04. B68 flutti niður í fjør. Rúni Nolsøe er nýggjur venjari, og Gunnar á Steig er nýggjur málverji. Í FSV04 eru toftamaðurin Jákup Eli Olsen og Jan C. Dam venjarar.

Í Leirvík vitjar TB. Tvørámenn hava staðið seg væl í steypakappingini, har teir hava gjørt enda á bæði B68 og SÍ. Óli Johannesen hevur ikki verið við í venjingunum seinastu tíggju dagarnar orsaka av landsliðsferðini í Georgia.

Niðurflytararnir í Fuglafirði fáa vitjan av HB. Um ÍF dreymarnir um Formula fótbólt skulu gerast til veruleika, so er neyðugt hjá ÍF at vinna øll stigini.

NSÍ og B36, sum eru nýggj lið í næstbestu deildini, hittast í Runavík, og sørvingar fáa vitjan av KÍ.